# Vælferð, javnaður og

**Í triðju greinini í greinarøðini um politisku støðuna í grannatjóðini fyri vestan taka vit íslendska javnaðarflokkin, Samfylkinguna til umrøðu. Flokkurin hevur undanfarna valskeið verið næststørsti flokkur á Altingi og varð til sum ein valsamgonga upp undir Altingsvalið í 1999. Men ikki fyrr enn í mai í 2000 varð Samfylkingin formliga stovnað sum flokkur. Samfylkingin er, sum er, einasti flokkur í Íslandi, ið hevur sett ES-limaskap á skránna. Val er í Íslandi komandi leygardag**




POLITIKKUR



*Carl Jóhan Jensen*
*Reykjavík*

Sum nevnt í undanfarnu grein er íslendsk stjórnmálasøga tey seinastu hálvfjers til trýss árini ólík norðurlendskari í tí, at í Íslandi var eingin stórur javnaðarflokkur virkandi. Landslagið vinstrumegin miðjuna var eitt satt jarðskjálvtaøki politiskt, sprunga lá við sprungu so langt sum eygað rakk og ímillum sóust flokkarnir sum seilir av mistrongari hugmyndafrøði.

Hugmyndin um at sameina allan vinstraveingin í ein flokk ella rørslu, sum evnaði at standa Sjálfstæðisflokknum syftuna í valundirtøku, hevur tó javnan verið frammi og er ongantíð kólnað burtur heilt, hóast striltið hevur gingið at fáa hana í verk. Aftur og aftur hava nýggir flokkar klovið seg burtur úr teimum gomlum við tí staðiliga endamáli at sameina vinstraveingin.

Seinasti flokkur av hesum slag, Þjóðvaki, kom fram í almenna ljósmálan í 1994 við tí stevnumiði at savna øll javnaðarsinnað í Íslandi í ein flokk.

Eftir Altingsvalið í 1995 sleit Sjálfstæðisflokkurinn stjórnarsamstarvið við Alþýðuflokkinn (sum tá var hin alment viðurkendi javnaðarflokkurin í Íslandi) og fór í stjórnarsamgongu við Framsóknarflokkinn. Sostatt vóru nú allir flokkarnir á vinstraveinginum komnir í andstøðu og skjótt fór eitt orðaskifti í gongd um at fylkja allan vinstraveingin á tingi undir sama merki. Tað hevð óivað eisini týdning í hesum viðfangi, at vinstraflokkarnir á býráðsvalinum í Reykjavík í 1994 kastaðu saman við Framsóknarflokkinn og gjørdu R-listan, sum feldi meirilutan í Sjálfstæðisflokkurinn hevði havt í mannaminni.

Hugurin at leggja saman var tó ymiskur í flokkunum. Í Alþýðuflokknum og Þjóðvaka, sum gingu saman á Altingi, var semja um sameingingina, men í hinum báðum flokkunum vóru mong í iva.

Kvennalistinn ella kvinnulistin var tann tíð tað var stovnaður við tí fyri eyga at hann skuldi vera eitt politiskt átak óheft av teirri gomlu floksskipanini. Tað elvdi tí til misnøgd innanveggja, at listin nú skuldi neglast upp í eitt javnaðarsamtak, og fleiri av teimum, sum vóru ímóti sameining kvittaðu við listan.

Í Alþýðubandalaginu var mótstøðan upp aftur harðari. Flokkurin gekk í tvíningum í spurninginum um sameining. Semja fekst ikki um fleiri avgerandi mál. Tey, sum vóru ímóti sameining, hildu at flokkurin fór at førka seg ov langt til høgru, um hann legði saman við Alþýðuflokkinn, sum á fleiri økjum hevði ein øðrvísi politikk enn Alþýðubandalagið, eitt nú var hann meiri hugaður fyri NATO og íslendskum limaskapi í ES. Ósemjan førdi til, at tey sum vóru ímóti, tóku seg úr Alþýðubandalaginu og stovnaðu Vinstri-grøna flokkin.

Samfylkingin stillaði, sum nevnt fyrstu ferð upp til Altingsval sum ein valsamgonga í 1999 og fekk tá 26,8 prosent av atkvøðunum. Í mai árið eftir var fylkingin formliga stovnað sum flokkur og Össur Skarphéðinsson varð valdur til formann í flokkinum.

Nakrar mánaðir fyri Altingsvalið í 2003 spurdust tey tíðindi, at Ingibjörg Sólrún Gísladóttir, táverandi borgarstjóri í Reykjavík bjóðaði seg fram á listanum hjá Samfylkinguni í Reykjavíkar norðara valdømi. Tíðindini komu óvart á mangan. Ingibjörg Sólrún, ið var ímyndin av R-listasamstarvinum og nógv umhildin sum borgarstjóri, hevði eftir býráðsvalið árið frammanundan fleiri ferðir boða frá, at hon ikki ætlaði at stilla upp til Altingsvalið. Nú kom hon sum ketta upp úr høvdatrog og hóast hon kom til tað seint upp í leikin, legði hon kortini valstríðið undir seg, vann fólkaansin og skuggaði fyri formannin. Nú var tað hon sum var forsætisráðharraevni hjá flokkinum, hóast óvist var, antin hon fór at vera vald ella ikki, tí hon var í einum ivasessi á listanum (í Íslandi er valskipanin øðrvísi enn hjá okkum við tað at atkvøtt verður fyri flokkum burturav. Valevnini eru uppstillað í nummarrøð og hvørt valevnið lukkast á ting velst, ymiskt um atkvøðutalið hjá flokkinum í viðkomandi valdømi og ymiskt um, hvussu ovarlaga valevnið er sett á listan).

Á valinum 10. mai 2003 fekk Samfylkingin 31 prosent av atkvøðunum, ein framgongd í mun til valið í 1999 upp á góð 4 prosent. Úrslitið var tó lakari enn mong høvdu væntað og vónað og flokkurin var sitandi í andstøðu.

Í valskeiðnum, sum skjótt er á enda, hava miklar rembingar verið í Samfylkinguni. Á landsfundi floksins í 2005 var stríðs-, ikki at siga krígsval um formanssessin og í teirri handbrá mátti Össur Skarphéðinsson lúta fyri Ingibjörg Sólrúnu Gísladóttir. Kinkurin sum kom í av floksformansvalinum hevur verið drúgvur at fara úr aftur. Ólag innanfloks og tvørrandi álit hjá veljaranum á, at flokkurin evnar tað sameiningarlutverk, hann ætlaði sær sjálvum, hevur havt við sær, at undirtøkan er minkað. Í veljarakanningum stendur flokkinum til tap. Sambært seinastu forsøgnum fer Samfylkingin at fáa umleið 20 prosent av atkvøðunum og missir sostatt útivið 10 prosent í mun til seinasta Altingsval.

### Stevnumiðini

Samfylkingin er sum sagt ein javnaðarflokkur av tí endurnýggjaða slagnum ikki óátøkur bretska arbeiðaraflokkinum eftir hamskifti í hálvfemsunum.

Javnaðarpolitikkurin hjá Samfylkinguni hevur ikki somu grund í sosialiskari hugsan, sum íslendskur javnaðarpolitikkur fyrr hevði, men hallar meira til liberal sjónarmið um vinnufrælsi, frían handil og vælferð.

Samanumtikið kann stevnuskráin hjá flokkinum lýsast soleiðis: at fyritreytin fyri búskaparligari menning og betri korum hjá fólki